# Uppi yvir einum ovurhitaðum búskapi

**Samgongan hevur givið landsstýrismanninum í fíggjarmálum heimild at tálma ovurhitaða búskapin gjøgnum fíggjarlógina fyri 2008. Árligi vøksturin á fíggjarlógini skal tálmast. Hetta ber ikki neyðturviliga sparingar við sær, men útreiðsluvøksturin skal tálmast. Tað kann merkja, at nakað av teirri menning av samfelagnum, sum annars er stungin út í kortið, má útsetast nakað. Lesið kronikkina sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og búskaparfrøðingurin, Magni Laksáfoss, skrivar, nú áðrenn politiska telvingin um fíggjarlógina fyri 2008 byrjar**



*Magni Laksafoss, landsstýrismaður*

MAGNI LAKSAFOSS
Kronikk

Hóast Føroyar ikki eru nær búskaparligu eggini, er kortini alneyðugt at tálma ovurhitaða búskapin.

Politisk semja er í samgonguni um, at tálmast skal umvegis fíggjarlógina fyri 2008. Í næstum byrjar fíggjarlógarsmíðið, og høvuðsmálið er at tálma útreiðsluvøkstrinum á fíggjarlógini.

Á ein hátt kunnu vit siga, at politiska skipanin skal til próvtøku, tí sterkur ryggur krevst at tálma búskapinum – serliga í einum valári.

> *Politiska skipanin skal til próvtøku, tí sterkur ryggur krevst at tálma búskapinum – serliga í einum valári.*

**Búskapurin tá henda samgongan tók við**
Tá henda samgongan tók við á várið 2004, vóru útlitini fyri búskapin vánalig. Rækjuvinnan var fyri bakkasti, og alivinnan hevði stóra afturgongd orsakað av sjúkum og lágum prísi. Tað var tí eyðsýnt, at neyðugt var at stimbra búskapin.

Afturgongdin í útflutninginum var uml 18 prosent frá 2003 til 2005, og innflutningurin minkaði uml. 10 prosent frá 2002 til 2004 – tvs. týðulig tekin vóru um afturgongd. Nettofráflytingin úr Føroyum var somuleiðis um 700 fólk tilsamans í tíðarskeiðinum frá 2004 til 2006.

Hetta kom tó ikki óvart á nýggju samgonguna, tí longu um heystið 2003 sótu nýliga fráfarni landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Bárður Nielsen, og eg sjálvur lið um lið í sambandshølunum á Gamla Apoteki og løgdu fíggjarpolitikkin til rættis fyri komandi fýra árini - herundir designaðu skattalættan.

Vit roknaðu við, at um einki varð gjørt fór fráflytingin at vera uml. 1.400-1.500 fólk tey fýra árini – tvs. uml. tað dupulta – hetta hevði nokk passað rímiliga væl.

Sum støðan var, væntaðu vit, at stígur fór at vera í búskapinum í 4 ár – m.a. út frá útlitunum í alivinnuni og rækjuvinnuni. Tískil løgdu vit 4-ára ætlarnir fyri fíggjarpolitikkin. Tað er samstundis frágreiðingin uppá tey 4 stigini í skattalættanum – eitt trin fyri hvørt árið.

**Væl eydnað tiltøk**
Fyri at minka um afturgongdina varð valt at reka ein ekspansivan fíggjarpolitikk, har m.a. skattalættar skuldu nýtast til at seta ferð á búskapin. Aðrar íløgur o.a. skuldu somuleiðis gerast fyri at skapa virksemi. Hetta merkti samstundis, at fíggjarlógin skuldi hava hall.

Sigast má, at tiltøkini eydnaðust væl. Stígurin í búskapinum vendi til framgongd, arbeiðsloysið minkaði, fráflytingin minkaði, optimisman kom aftur – og skjótt var afturgongdin gloymd.

**Skattalættin náddi málinum**
Skattalættin bleiv, sum nevnt, gjørdur í fýra stigum – eitt fyri hvørt árið. Høvuðsendamálið var at stimbra búskapin, men skattalættin bleiv eisini designaður til at økja um hugin hjá tímaløntum at arbeiða meiri – tvs. tað skuldi loysa seg betur at arbeiða. Báðar ætlarnirnar vóru væleydnaðar. M.a. hava vit frætt, at lønarkrøvini hjá fakfeløgunum ikki hava verið eins hørð, tí skattalættarnir hava givið limunum reallønarframgongd.

Nakað av kritikki hevur tó verið av skattalættanum. Trupulleikin kom inn, tá skattalættin varð kombineraður við Samhaldsfasta. Her skal tó viðmerkjast, at tað var ikki Samhaldsfasti í sær sjálvum, sum var trupulleikin – men kombinatiónin av skattalætta og Samhaldsfasta.

Virkningurin bleiv – og er enn – at tað, sum varð latið í skattalætta til teir lægstu lønarbólkarnar, varð tikið inn aftur í Samhaldsfasta. hetta arbeiðir fíggjarmálaráðið við at gera nakað við í einum nýggjum skattauppskoti.

Kortini hevur skattalættin verið eitt gott tiltak, sum stimbraði búskapin, tá tað var neyðugt, gjørdi tað hugaligari hjá fólka at arbeiða meiri og hevur verið við til at tálma lønarvøksturin.

Ein lærdómur er tó nokk, at vit áttu kanska ikki at skrivað ein fýra ára skattalætta inn í eitt samgonguskjal. Tíðirnar broytast jú skjótt, og tað gjørdu tær eisini í hesum valskeiðinum.

**Afturgongd vend til framgongd**
Í 2005 fór aftur at ganga framá í búskapinum. Hetta stóðst lutvíst av skattalættanum, lutvíst av góðum vinnupolitikki og lutvíst av øðrum stimbrandi tiltøkum – m.a. við at hall var á fíggjarlógini. Vit eiga at frøðast yvir, at politikkurin hevur verið væl eydnaður.

> *Skjótt vendist í búskapinum. Vit eru farin frá 8 mia. í skuld til 4 mia. í ogn og niður aftur á null eftir fáum árum. Hetta vísir, at ovurhitingin ikki einans er ein spurningur um arbeiðsmarknaðin. Onnur viðurskifti fara eisini av lagi, tá búskapurin er ov heitur*

Vit mugu tó samstundis eisini minnast til, at tað ikki einans var politikkurin, sum skapti búskaparliga framgongd. Rentan var sera lág, og nýggj lán við avdráttarfrælsi komu á marknaðin. Hetta stimbraði keypið og harvið búskapin og hevði eisini árin á handilsjavnan og gjaldsjavnan.

Tá fíggjarlógin fyri 2006 varð løgd á heysti 2005, var ikki lætt at vita, at keypshugurin og stimbranin fór at vera so stór. Tí varð politikkurin ikki lagdur um í 2006, men var framhaldandi ekspansivur – hetta var tó neyvan nakar stórur feilur. Tó má nokk sigast, at tað var eitt mistak einki at gera fyri at tálma í 2007. Tá átti tað at hava verið gjørt!

**Arbeiðsmarknaðurin og Føroya Banki**
Framgongdin í búskapinum, ið stavaði frá stórari keypiorku orsakað av lægri rentu og nýggjum lánum, var ikki einans í Føroyum, men eisini í útlandinum, og hetta merkti størri eftirspurning eftir m.a. arbeiðsmegi og partabrøvum.

Hetta hevur elvt til størri trýst á føroysku arbeiðsmegina. Føroysku virkini hava tí havt ringt við at kappast um arbeiðsmegina. Fyri at hjálpa uppá hetta hevur landsstýrið ætlarnir um at opna arbeiðsmarknaðin á ein skipaðan hátt fyri at fáa hendur á meiri arbeiðsmegi.

Økta keypiorkan hevur eisini elvt til hækkandi partabrævakursir, og kursirnir sigast nú at vera søguliga høgir á m.a. fíggjarstovnum. Einskiljingin av Føroya Banka fall tí heppið út, og landsstýrið fekk ein góðan prís á partabrævamarknaðinum. Hetta eiga vit eisini at frøðast um, sjálvt um nógv uttan iva kenna seg at hava fingið ov fá partabrøv, tí eftirspurningurin var so stórur.

**Útlitini komandi árini**
Frá at hava byrjað við afturgongd er búskapurin nú vendur til stóra framgongd – hvørji eru so útlitini komandi árini? Fyri at svara hesum mugu vit hyggja eitt sindur at, hvat hendir í verðini rundan um okkum.

Vit kunnu staðfesta, at oljuprísirnir aftur eru hækkandi. Orkustovnurin hjá OECD, International Energy Agency (IEA), og National Petroleum Council (NPC), sum er eitt ráð mannað av amerikonskum oljufeløgum, meina, at oljuprísirnir eisini frameftir fara at hækka. Tí heita hesir stovnar á londini í OECD um at leggja um til aðrar orkukeldur enn olju. Tá henda ráðgeving kemur frá sjálvum oljufeløg-